## HB vann óvæntað

Kvinnuliðið hjá HB fekk síni fyrstu stig, tá ið tær sunnudagin spældu á heimavølli ímóti EB/Streymi. Hetta var ikki tann dysturin, sum roknað varð við, at HB skuldi hava sínar bestu møguleikar, men tað eydnaðist havnaliðnum at fáa einasta málið í dystinum. Málið kom beint fyri leiklok. EB/Streymur hevur annars fingið góð úrslit í ár, men sunnudagin máttu tær lúta fyri HB. Hetta var einasti dysturin í kvinnudeildini, sum varð spældur sunnudagin.




## Súni skoraði fyri AaB

AaB spældi týskvøldið í Viasat Cup, sum er ein kapping fyri superligafeløgini, har vinnandi liðið fær tríggjar milliónir krónur. AaB var á heimavølli ímóti SønderjydskE og vann heili 3-1. Súni Olsen spældi allan dystin á miðvøllinum hjá AaB, og hann skoraði eisini eitt av málunum. Tað var eftir ein lítlan tíma, tá ið hann dróg inn í brotsteigin og smekkaði bóltin í málið. Við sigrinum á SønderjydskE vann AaB seg víðari í kappingini.

# Tungasta byrjan nakrantíð

**Petur Simonsen duldi ikki fyri, at hann var nakað lættari í sinni, tá sigurin á Skála var staðfestur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hann er ein av allar mest royndu venjarunum í landinum, og soleiðis hevur hann roynt eitt sindur av hvørjum.

Men slíka byrjan, sum fuglfirðingar hava fingið í ár, hevur Petur Simonsen ongan tíð áður verið vitni til.

– Nei, tða má eg viðganga. At vit longu eftir sjey umfør spæla við knívinum á barkanum, haldi ikki vera nakað, sum eg havi roynt.

*Hvussu tacklar tú sum venjari eina slíka støðu?*

– Tú má sjálvandi royna at arbeiða, og eg má eisini siga, at spælararnir allir hava vilja arbeitt. Ikki minst hevur hugburðurin verið framúr hesar tríggjar seinastu vikurnar. Okkum hevur kanska vantað trúnna uppá sigrarnar, men nú hava vit so fingið tveir á rað av slagnum, og tað kann vónandi eisini lyfta alt liðið. Ikki minst, tí spælararnir megnaðu at reisa seg frá ringast hugsandi byrjanini mánadagin, heldur Petur.



*Petur Simonsen hevði stórar og nógvar rósur at bera spælarunum, sum upp á tvær vikur hava strítt ÍF upp um niðurflytingarstrikuna*

Skála-ÍF 1-2 (1-0):

# Bæði ferðaðust um strikuna

**Fyri fyrstu ferð í ár er ÍF oman fyri niðurflytingarstrikuna. Mánakvøldið vunnu teir á Skála, sum eftir tvey ár í toppinum nú aftur er at finna í botni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Fuglfirðingar hava veruliga funnið stríðsviljan aftur. Mánakvøldið fingu teir ringast hugsandi byrjanina, men kortini eydnaðist at toga ein 2-1 sigur heim við sær*

*savnsmynd*

Skálamenn fingu annars eina dreymabyrjan. Fuglfirðingar mistu bóltin mest sum alt fyri eitt, eftir at hesin var givin upp, og so gekk tað skjótt fyri seg. Bogi Gregersen gjørdist púra leysur, og tó at Karsten Joensen bjargaði royndini, so kundi Bjarni Jørgensen stúta returin í manntóma málið til 1-0.

Og restina av fyrra hálvleiki sat Skála væl á dystinum. Fleiri ferðir gjørdist talan eisini um góðar møguleikar, men ein stórspælandi Karsten í ÍF-málinum helt tó gestunum í dystinum.

### Góður moralur

Við verandi støðu á stigatalvuni og við vánaligu byrjanini í huga, so er einki løgið, um viðhaldsfólk hjá ÍF óttaðust, at liðið skuldi fara niður við nakkanum.

Hetta hendi tó ongantíð. Sum dysturin leið, so megnaði ÍF eisini at leggja eitt ávíst trýst á Skála, og tá møguleikin beyðst, so megnaðu teir eisini at avgera dystin. Gott korter fyri leiklok megnaði Høgni Zachariassen at beina bóltin í málið eftir hornaspark, og fáar minuttir seinni smekkaði innskifti Dánjal Pauli Højgaard bóltin í meskarnar. Valda Filipovic tóktist ikki vera alt ov tryggur í hesi seinastu støðuni, men tað løgdu fuglfirðingar líka í. Teir striddust av øllum alvi seinastu 10 minuttirnar, og so var fagnaðurin stórur, tá dómarin hevði bríklsað seinastu ferð.

### Skiftu pláss

Úrslitið bar við sær, at liðini ferðaðust hvør sín veg um strikuna, og so kundi fagnaðurin hjá ÍF valla verið størri. Tapið fyri VB/Sumba í sætta umfarinum tóktist tá nærum vera mønustingurin hjá liðnum. Men heldur enn at fella í fátt, hava fuglfirðingarnir reist seg síðani hetta, og verður ferðin í stigasavnanini hildin, kemur niðurflyting ikki upp á tal.

Hjá Skála er støðan nakað nógv øðrvísi. Enn er knúsandi sigurin á VB í triða umfarinum einasti tann einasti, sum liðið hevur vunnið, og tað verður ikki nóg mikið í longdini.

Skaðar í langar banar hava tó eisini gjørt sína ávirkan, men nú røkist spakuliga fyri, at lyklaspælarar aftur eru tøkir. Pauli G. Hansen var hesa ferð við frá byrjan, og í steðginum varð Jónhard Frederiksberg sendir á vøllin.

Tørvur er tó eisini á øllum kreftum, tí við tapinum endaði Skála niðanfyri strikuna, sum teir mest sum ikki hava ansað seinastu tvey kappingarárini. Hinvegin, so er munurin upp ikki somikið stórur, at tørvur enn er á einum veruligum Skála, sum liðið jú eisini megnaði seg at duga so væl.

## FAKTA UM DYSTIN

**Skála-ÍF 1-2 (1-0)**
1-0 Bjarni Jørgensen, 1.
1-1 Høgni Zachariassen, 73
1-2 Dánjal Pauli Højgaard, 77
**Dómari:** Dagfinn Olsen
**Skála:** Vlada Filipovic – Pætur Dam Jacobsen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Borgar Kristiansen – Bjarni Jørgensen (Rói Jacobsen, 74.), Pauli G. Hansen, Levi Hanssen (Jónhard Frederiksberg, 46.), Bárður Danielsen, Poul N. Poulsen (Debus Danielsen, 46.) – Bogi Gregersen.
**ÍF:** Karstin Joensen – Frank Poulsen, Árni Petersen (Tórður Lervig, 88.), Símun Eliasen, Fritleif í Lambanum – Hanus Eliasen (Arnold Joensen, 46.), Aleksander Jovevic (Dánjal Pauli Højgaard, 65.), Eyðun Ryggshamar, Atli Petersen – Høgni Zachariassen – Bartal Eliasen.

## formuladeildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 9 | 6 | - | 2 | - | 1 | 19 | 9 | 10 | 20 |
| 2 HB | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 24 | 12 | 12 | 17 |
| 3 KÍ | 9 | 4 | - | 5 | - | 0 | 18 | 9 | 9 | 17 |
| 4 GÍ | 9 | 4 | - | 4 | - | 1 | 15 | 9 | 6 | 16 |
| 5 B36 | 9 | 4 | - | 4 | - | 1 | 12 | 9 | 3 | 16 |
| 6 NSÍ | 9 | 4 | - | 3 | - | 2 | 18 | 12 | 6 | 15 |
| 7 ÍF | 9 | 2 | - | 0 | - | 7 | 12 | 25 | -13 | 6 |
| 8 VB/S | 9 | 2 | - | 0 | - | 7 | 9 | 30 | -21 | 6 |
| 9 Skála | 9 | 1 | - | 2 | - | 6 | 11 | 13 | -2 | 5 |
| 10 B68 | 9 | 1 | - | 2 | - | 6 | 8 | 18 | -10 | 5 |